# Var skúlanæmingur í Klaksvík

**Leygardagin heilsaðu vertirnir fyri sekstan árum síðani aftur upp á skúlanæmingin, sum nú er landsliðsspælari í Luksemborg**

ENDURVITJAN
*Jóannes Hansen*



*Bjørg og Odd Fjalsbak høvdu tann nú 29 ára gamla Patrick Possing búgvandi hjá sær tvær vikur í 1985. Leygardagin var hann á vøllinum, tá Luksemburg dystaðist í Føroyum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

29 ára gamli Patrick Possing var ikki púra ókendur við Føroyar, tá hann í síðstu viku saman við liðfeløgunum á landsliðnum hjá Luksemborg fór heimanífrá fyri at spæla landsdyst í Føroyum.

Petrick Possing, sum leygardagin hevði ellivu talið á rygginum og sum spældi við allar 90 minuttirnar var í Klaksvík miðskeiðis í áttati árunum.

– Hann var í tvær vikur skiftis næmingur. Sonur okkara, Jógvan Páll, var í tvær vikur í Luksemborg, har hann búði hjá teimum, og Patrick var í tvær vikur í Klaksvík og búði hjá okkum.

Tað eru Bjørg og Odd Fjalsbak í Klaksvík, sum greiða frá hesum á Svangaskarði leygardagin. Tey vóru komin at heilsa upp á gamla kenningin, sum ikki hevur verið aftur í Føroyum síðani hann var her fyri sekstan árum síðani.

Eftir lokið stríð og eitt kærkomið heitt brúsubað tosaðu Patrick Possing og Fjalsbak hjúnini í Klaksvík eina løtu saman, áðrenn ferðalagið úr Luksemborg fór aftur á Hotel Føroyar, har teir hildu til, inntil teir sunnumorgunin fóru av aftur landinum. Møguleiki var ikki hesa ferð hjá Patrick at fara til Klaksvíkar.

*Spældi tú nógv fótbólt, tá tú fyri sekstan árum síðani vart í Klaksvík?*

– Ongantíð. Tað høvdu vit ikki stundir til. Tað var nógv meiri spennandi at sigla og fiska, greiðir Patrick Possing frá.

### Pinkutjóðirnar øðrvísi kor

Tá prátið kemur inn á fótbólt, dylir Patrick ikki, at hann er eitt sindur vónbrotin:

– Vit høvdu vónað at fingið stig og kanska at vunnið í dag. Tað eydnaðist ikki, og tað er harmuligt. Men tað mest harmuliga er, at vit ikki hava havt møguleika at spæla um stigini. Tað, sum gekk fyri seg á vøllinum, kalli eg ikki fyri fótbólt.

Patrick Possind dadlar ikki føroyingunum fyri veðrið og fyri, at dysturin varð spældur í sovornum umstøðum. Tað er altíð upp til dómaran at gera av, um tað ber til at spæla.

– Vit mugu bara staðfesta, at tað er munur á at vera ein stór fótbóltstjóð og at vera pinkutjóð í altjóða fótbólti. Tað er einki at ivast í, at um hesar umstøðurnar vóru, so hevði dysturin verið avlýstur, um tað vóru Týskaland og Ongland og ikki Føroyar og Luksemborg, sum skuldu spæla. Teir, sum hava avgerðandi orðið, hava ivaleyst hugsað, at føroyingar og teir úr Luksemborg duga ikki at spæla fótbólt kortini. Teir sparka í staðin fyri at spæla, og tí er tað líka mikið, hvørjum umstøðum dysturin verður spældur í, heldur Patrick Possing hálvt í skemti og hálvt í álvara fyri, áðrenn hann biður gomlu vertsfamiljuni í Klaksvík farvæl og saman við vónbrotnu og illa á holdum komnu liðfeløgunum setur seg í bussin.

Bjørg og Odd Fjalsbak veittra farvæl og fara aftur til Klaksvíkar, og myndamaðurin á Sosialinum hevur syrgt fyri, at minnið um løtuna, tá tey aftur hittu skúlanæmingin, er komin á prent.

# Ikki bangin um vøllin

**Formaðurin á Svangaskarði tóktist ikki bera ótta fyri, um vøllurin fór at halda**

RUNDANUM DYSTIN
*Jákup Mørk*



*Formaðurin í B68 tóktist ikki bera ótta fyri heilsustøðuni hjá vøllinum á Svangaskarði*

Meðan spælararnir hjá Føroyum og Luksemburg skreiddu runt á regnváta vøllinum leygardagin, fingu vit orðið á Niclas Davidsen, sum er formaður í B68.

Tað er jú B68, sum eigur vøllin á Svangaskarði, men hóast dysturin at síggja til fór rættiliga illa við vøllinum, so tóktist formaðurin tó á ongan hátt at bera ótta fyri, at hesin skuldi oyðileggjast av mongu glíðandi taklingunum.

- Nei, vøllurin má bara taka tað, sum kemur. Eg haldi ikki, at tað er vandi fyri, at hann verður oyðilagdur av dystinum, tí tað gongur lutfalsliga stutt tíð, áðrenn hann verður heilur aftur.

### Var heilt góður

Um tað mundi, tá vit tosaðu við formannin, var helmingurin av dystinum farin aftur um bak, og hóast onkrar heilt stórar hyljar, so sá vøllurin so toluliga væl út, og í hvussu so er vóru eingi greflig sár at síggja.

- Eg haldi hann sær bara gott út. Hann var eisini ógvuliga góður undan dystinum. Vit mugu bara síggja í eyguni, at í sovorðnum veðrið, so verður vøllurin rættiliga vátur. Tað er so nakað, sum vit neyvan sleppa undan, sigur Niclas Davidsen at enda.

# Eingi leikaraummæli

**Umstøðurnar, sum dysturin varð spældur undir, gera tað nærum ógjørligt at koma við nøkrum veruligum ummæli av avrirkunum hjá einstøku leikarunum**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*



*At eingi ummæl,i verða givin, merkir ikki á nakran hátt, at leikararnir ikki gjørdu sína skyldu á vøllinum. Her er tað Fróði Benjaminsen, sum er fyrstur á bóltinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tá fótbóltslandslið okkara hevur verið í eldinum, hevur tað verið vanligt her á blaðnum, at vit hava givið leikarunum ummæli um, hvussu teir hava staðið seg á vøllinum.

Ymiskt er kanska, hvussu beinrakin hesi ummæli hava verið, men hóast alt hava vit alla tíðina valt at hildið fast um hetta.

### Stóðu sum ein

Eftir dystin leygardagin er tó gjørt av, at á hesum sinni verða eingi leikaraummæli skrivað. Hetta er snøgt sagt gjørt av teirri orsøk, at umstøðurnar undir dystinum viðførdu, at metingargrundarlagið undir einum slíkum ummælið er alt ov tunt í hesum føri.

Tað kann tó staðfestast, at í tí lutinum, sum mest ráddi um leygardagin, stóðu allir leikararnir seg væl. Stríðsviljin og kropsstyrkin mundu vera fremstu vápnini hendan dagin, og her stóðu allir okkara seg sum ein maður. Sum dysturin leið, tóktist tað alt meira sjónligt, at tað vóru okkara, sum høvdu størsta yvirskotið í so máta, eins og tað eisini vóru okkara, sum sýndu størsta viljan at sigra. Bæði á mótstøðumonnunum og veðrinum.

Sum kunnugt gav hetta so eisini úrslit, soleiðis at vit fingu trý kærkomin stig til høldar, og ivaleyst leggja leikararnir meira í hetta, heldur enn í nøkur jánkaslig ummæli frá einum ítróttarskrivara.

Nr. 169 - 4. september 2001 ítróttur


# Ein hálv millión skeiva vegin

**Tað er neyvan langt av leið at rokna við, at illveðrið hevði við sær, at 3000 áskoðarar settust aftur leygardagin**

FÓTBÓLTSPENGAR
*Jóannes Hansen*



*Nógva regnið hevur helst kostað FSF úti við hálva millión krónur, og harumframt kostaði sigurin eisini 175.000 krónur í bonuspengum til leikararnar*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Veðrið og týdningarmiklir fótbóltsdystir í Føroyum hava ikki verið vinir í ár. Tá finalan um løgmanssteypið var á skránni ólavsøkudag, varð frammanundan roknað við, at tað fóru í hvussu so er at møta trý túsund áskoðarar upp. Seinnapartin ólavsøkudag var sovorðið illveður, sum tað ikki hevur verið á sumrinum. Tað hevði við sær, at áskoðaratalið var kanska bara ein sætti partur at tí, sum frammanundan var roknað við. Hvussu nógvir áskoðarar heilt nett vóru var ikki almannakunngjørt.

Leygardagin var aftur týdningarmikil dystur á skránni. Eftir døgurða var veðrið so vánaligt, sum tað ikki hevur verið síðani á ólavsøku. At 1.470 áskoðarar møttu upp í sovornum líkindum kann boða frá øðrum, enn at føroyingar framvegis eru áhugaðir í at síggja føroyska liðið spæla, tá tað er møguleiki fyri, at Føroyar kunnu vinna.

Út frá hesum og út frá undanfarnu dystunum er einki at ivast í, at áskoðaratalið hevði verið tríggjar og kanska fýra ferðir so stórt, sum tað var, um veðrið hevði skikkað sær hampuliga.

– Tað tykist sum um fólk fylgja væl við, hvat hann sigur um veðrið. Hesa ferð vóru bara fýra hundrað atgongumerki seld í forsølu. Tað er væl minni, enn tað plagar at verða selt frammanundan. Longu mánadagin segði veðurforsøgnin, at tað fóru at vera vánalig líkindi seinnapartin leygardagin. Tíverri vísti tað seg, at hetta gjørdist veruleiki. Tað høvdu møguligu áskoðararnir tikið til eftirtektar, og tí er væl hugsandi, at vit um døgurðatíð leygardagin kanska mistu fleiri túsund áskoðarar, heldur Ísak Mikladal, aðaðskrivari í Fótbóltssambandinum.

Miðal atgongugjaldið hjá teimum 1.470 áskoðarunum, sum treiskaðust í út av lagi vánaligu líkindunum, var 110 krónur.

Verður roknað við, at trý túsund fleiri høvdu verið og hugt at, um veðrið hevði verið, sum tað var fríggjadagin og sunnudagin, so ber tað eina mista inntøku upp á 330 túsund krónur.

### 175 túsund í bonus

Allir føroyingar fegnast um, at tað eydnaðist landsliðnum at vinna 1–0 á Luksemborg. Men sigurin kostaði Fótbóltssambandinum ikki so lítið av pengum. Sambært avtaluna millum FSF og spælararnar, so eiga spælararnir átta túsund krónur í part fyri hvønn sigurin. Venjararnir eiga eisini lut í bonus pengum. Tað verður roknað við, at FSF skal rinda 175 túsund krónur í bonus pengum fyri hvønn sigurin.

– Vit fegnast um, at tað eydnaðist at vinna, men tað hevði sjálvandi verið uppaftur hugaligari hjá okkum at rinda bonus pengarnar, um onkur hevði viljað sponsorerað útgjaldið. Tað hevur ikki eydnast at finna nakran stuðul til hetta endamálið. Tað vil við øðrum orðum siga, at pengarnir fara beinleiðis av kontoini hjá Fótbóltssambandinum, staðfestir Ísak Mikladal.

# Ikki bara Todi

**John Petersen er – burtur sæð frá Toda Jónsson – fyrsti føroyski landsliðsleikarin í 12 ár, sum fær tillutað brotsspark**

BROTSSPARK
*Jákup Mørk*



*John Petersen hevði ikki stórvegis trupulleikar av at detta á váta lendinum, tá beinini vórðu tikin í brotsteiginum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Sum kunnugt, so var tað John Petersen, sum var upphavið til føroyska málið móti Luksemburg, tá hann varð feldur inni í brotsteiginum fimm minuttir fyri leikloki.

### Nýttist ikki at detta

Tá vit seinni fingu fatur á John, hevði hann eisini sæð hendingina á sjónbandi, og hann var ikki í iva um, at talan var um brotsspark.

- Eg kapprann móti tveimum av teirra spælarum eftir bóltinum, og tá teir onkursvegna rendu saman, gjørdist eg fríur. Síðani var eg ikki heilt greiður um, hvat hendi, men í sjónvarpinum sá eg, at ein verjuspælari hjá teimum mest sum rennir inn í beinini á mær, so eg detti. Brotsspark var tað so í øllum førum, og talan var avgjørt ikki um, at eg filmaði meg til brotssparkið, sigur John, og leggur afturat, at tað so avgjørt ikki var neyðugt at filma, fyri at detta á váta vøllinum.

Brotssparkið setti Jens Kristian Hansen ósvikaliga trygt í netið. Sum nevnt aðra staðni í blaðnum, so hevði Jens Kristian 30 ára føðingardag mánadag, og vit spurdu tí John, um hann nú roknaði við, at honum ikki nýttist at hava nakra gávu við til liðfelagan, tá landsliðsleikararnir aftur savnaðust sunnukvøldið.

- Hatta var so í øllum førum ein lítil gáva. So fáa vit at síggja, um hann eisini fær okkurt annað.

### Gjørdi tað gott aftur

Annars hevði júst John Petersen ein hin besta føroyska møguleikan í dystinum, tá hann stutt inni í seinna hálvleiki sendi upp um málið hjá Luksemburg. Um hetta segði álopsspælarin á leið soleiðis eftir dystin.

- Bólturin kom innfyri oghevði beina kós ímóti mær, men eg gjørdist eitt sindur í iva um, hvussu eg skuldi gera. Bæði skrúvan á bóltinum og vindurin gjørdu, at eg ivaðist um eg skuldi seta høvdið á, ella taka hann við beininum. Tað endaði so við, at eg setti beinið á, og so fór bólturin upp um. Tað var í øllum førum ein somikið stórur møguleiki, at eg skuldi rakt málið.

Nú gjørdi John so sjálvur skaðan góðan aftur, tá hann fekk tillutað føroyska brotssparkið, og heldur enn at iðra seg um misnýtta møguleikan, so fagnaðiast álopsmaðurin um hetta eftir dystin.

- Tað hevur annars verið Todi, sum hevur fingið nógvu tey seinastu brotsspørkini hjá okkum, men hetta vísir, at tað ikki bert er hann, sum fær brotsspørk. Har afturat gav mítt brotsspark so í øllum førum mál, sigur ein flennandi John Petersen at enda.

GÍ-Skála 1-0 (1-0):

# Botnliðið vann á oddinum

**Púrasta óvæntað megnaði GÍ at fáa øll stigini, tá Skála var á vitjan sunnudagin**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Tað var toppur móti botni, tá Skála fór til Gøtu sunnudagin, men úti á vøllinum sást tó lítið til, at so var.

Sum skilst á lagnum, megnaði oddaliðið ongan tíð at seta seg á dystin, soleiðis sum roknast kundi við, at fóru at gera. Spælið var í nógvar mátar merkt av tilvildini, og tað var eisini rættiliga langt ímillum, at veruligir málmøguleikar spurdust burtur úr uppspælinum hjá liðunum báðum.

Í fyrra hálvleiki fekk GÍ tó ein møguleika í gávu, tá skálamenn sjuskaðu við afturlegging. Áslakur R. Petersen, sum var leikbannaður fyri viku síðani, og tí kundi spæla á næst besta liðnum, kom ímillum, og eftir at hava rundað ein verjuleikara, trillaði fuglfirðingurin millum beinini á málverjanum.

### Hart spæl

Í seinna hálvleiki løgdu gøtumenn, sum vera man, størsta dentin á verjupartin. Skálamenn megnaðu ongan tíð at bróta væl skipaðu verjuna niður, og ikki minst mundi tað her vera saknur í leikligu evnunum hjá Paula Hansen, sum var leikbannaður.

Til tíðir gjørdist spælið eisini hampuliga hart, og tað einu ferðina gjørdist úrslitið eitt reytt kort, tá Arnold Berg var offur fyri eini ógvusligari takling. Enn er óvist, hvussu álvarsligur skaðin var, men tá sá ógvusligt út, tá sjúkrabilurin kom á staðið eftir skálamanninum.

Seinasta hálva tíman mátti GÍ soleiðis spæla við tíggju monnum, men teir megnaðu framvegis at halda tætt, og sæð burtur frá einum tveimum royndum frá skálamonnunum, so varð talan heldur ikki teir stóru málmøguleikarnar.

**GÍ-Skála 1-0 (1-0)**

1-0: Áslakur R. Petersen